# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Karóly Potemkin úr EB/Streymi í hornatøkum við Ólav í Ólavstovu hjá HB, meðan Hans á Lag er klárur at traðka til*

# Fantastisk finala

**Tað einasta, ið kundi verið eitt sindur betri, var veðrið. Annars hevði finalan um løgmanssteypið alt, sum ein finala eigur at hava. Spenning, dramatikk, mál. Og fyri fyrstu ferð kundi EB/Streymur kalla seg gullvinnara eftir ein rúkandi enda, har bæði liðini kundu og áttu at havt skora minst tvey mál í part**

FÓTBÓLTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Sofus Johannesen*

*EB/Streymur*

*HB*

Sjey mál í einari finalu, og minst tvey teirra mugu kallast reinar perlur.

Frøin hevur verið øgilig í Sundalagnum í gjárkvøldið. Felagsliðið veitti sær sjálvum eitt stórt plástur á sárið, teir fingu í fjør, tá teir mistu meistaraheitið á stokkinum. Fyrsta gullið er komið í hús eftir minniligastu finaluna í mong ár.

Felagsliðið fekk eina flúgvandi byrjan. Onkusvegna helt Rasmus tað vera skilagott at sláa bóltin við hondini inni í brotsteiginum, men hesum loyvdi dómarin ikki, so longu eftir tveimum minuttum av steypafinaluni, var fyrsta málið komið. Tað syrgdi Soren Anghel fyri frá 11-metur blettinum.

Og fáar minuttir seinni fingu áskoðararnir nakað, ið saktans kann fara at líkjast ársins máli í føroyskum fótbólti. Hans Pauli Samuelsen fær ein høgan bólt úti í vinstra borði, temur hann hegnisliga fyri síðani við einari smartari fintu at snúgva sær inn í brotsteigin framvið Mortani úr Hørg, og at enda við einum vøkrum skrúvaðum skoti at senda bóltin í handara síðunet uttan møguleika hjá Tróndi at bjarga.

Ein perla og eitt mál í høgum altjóða flokki.

HB-liðið var sjónliga skelkað av hesari vanlukkuligu byrjan, og næstu longu løtuna høvdu teir ilt við at fáa tamarhald á spælinum. Hendan løtan var eisini merkt av ørgrynnu av fríspørkum. Men hesa løtuna var Hans Pauli Samuelsen í hopla, og Arnbjørn gjørdist fríur inni í brotsteiginum, tá Hans Pauli vippaði bóltin upp- og innum HB-verjuna, men Arnbjørn fekk ikki skot á bóltin.

Løtu seinni bar betur til. Aftur var tað Hans Pauli, ið var arkitekturin í vinstru síðu, legði bóltin væl inn til Anghel, sum við hælinum sendi útfrá til Ronnie Samuelsen. Tróndur hálvbjargaði skotinum frá honum, og ripostin stútaði Arnbjørn upp um Trónd og í málið til 3-0.

## Møguleikar og gul kort

Stutt eftir hetta mátti Arnbjørn av vøllinum við einum snuddi, hann fekk, tá hann skoraði. Inn fyri hann kom Karóly Potemkin.

Men hóast HB soleiðis var komið afturút 0-3 eftir bert 20 minuttum, góvu teir ikki skarvin yvir kortini, og tá lítil hálvur tími var farin, vóru teir nær við at minka um munin, men ein fantastisk refleksbjarging frá René Tórgarð forðaði Røgva Jacobsen at koma á talvuna.

Nakrar minuttir seinni fekk Røgvi enn ein møguleika við høvdinum, men hesaferð var hann ikki nóg neyvur og headaði bóltin við síðuna av. Haðani fleyt spælið í mótsatta enda, har Hans Pauli hevði ein heilfluktara eftir innlegg úr høgru, men hesaferð lat Tróndur Vatnhamar seg ikki lumpa.



*Arnbjørn Hansen hevur tveitt seg fram og stútað bóltin upp um Trónd Vatnhamar í málið til 3-0 til EB/Streym*

HB fekk nú betur tak á spælinum, og hevði í longum løtum gott spæl, har teir ofta kundu gera sær dælt av góðum plássi í høgru síðu, sum gav seg úrslit í fleiri vandamiklum innleggum frá Jákupi á Borg.

Albert Ellefsen hevði tá valt at taka avleiðingarnar av vánaligu byrjanini, við at taka bæði Mortan úr Hørg og Rasmus Nolsøe út og seta Vagn Mohr Mortensen og Páll M. Joensen inn í staðin fyri, longu tá hálvur tími var farin.

Í hesum lívliga hálvleikinum valdi dómarin at fara tríggjar ferðir í lumman eftir korti, og Marni Djurhuus og Ronnie Samuelsen úr EB/Streymi og Páll M. Joensen úr HB sóu gult.

## René in action

Endin av fyrra hálvleiki var hektiskur, fyrst tá Hanus Eliasen fekk risamøguleika, men mitt fyri málinum sendi hann eitt innlegg frá innskifta Potemkin yvir